# ÁRSFRÁGREIÐING 2023



SINNISBATI

**Sinnisbati**

c/o MEGD, Íslandsvegur 10C

FO-100 Tórshavn

Tlf: + 298 597913

Teldupostur: sinnisbati@sinnisbati.fo

www.sinnisbati.fo

**Nevnd**

Súsanna Olsen, forkvinna

Oda Jóhansdóttir, næstforkvinna

Rannvá Dam Thomsen, kassameistari

Súsanna Herdalur Tausen, skrivari

Erla Matras Jensen, nevndarlimur

Minna Sólfinnsdóttir, nevndarlimur

Vivian Sjóðklett, nevndarlimur

Margretha Poulsen, tiltakslimur

Joan B. Poulsen, tiltakslimur

Elisabeth Carlsson, tiltakslimur

Anna Joensen-Næs, umboð fyri Sinnisbata Ung

**Starvsfólk**

Gunnhild Persson, aðalskrivari

Ninna R. Simonsen, skrivstovufólk

//Útgivið mars 2024

SINNISBATI

# INNIHALD

04 Fororð

05 Um Sinnisbata

08 Árið, ið fór

19 Framyvir

# FORORÐ

Árið 2023 er eitt ár, ið er merkt við nógvum virksemi og spennandi nýggjum verkætlanum, men tað er samstundis eitt ár, sum er merkt við sparingum og skerjingum. Eins og á hvørjum ári, hevur Sinnisbati skipað fyri tiltøkum, skrivað lesarabrøv og hoyringsskriv, luttikið á ráðstevnum og skipað fyri sjálvhjálparbólkum.

Við økta virkseminum og krøvunum til Sinnisbata seinnu árini, og eini játtan, ið ikki hevur fylgt við, hevur tað verið trupult at fingið roknistykkið at ganga upp. Tí hevur Sinnisbati verið noydd at skerja bæði virksemið á skrivstovuni og í kjatt-ráðgevingini.

Í 2023 er tað serliga sálarheilsan hjá okkara ungu í Føroyum, ið hevur verið á breddanum. Nýggj føroysk kanning frá 2023 vísir, at tað serliga eru ov nógvir valmøguleikar, høgar væntanir og avmarkingarnar í einum lítlum samfelag, ið tyngja sálarheilsuna hjá teimum ungu. Samstundis sum vit síggja ein ungdóm í mistrivnaði, valdi Landsstýrið í 2023 at skerja tilboðið um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð, so aldursbólkurin 26-35 ár, ikki longur er fevndur av tilboðnum.

Sinnisbati hevur leingi havt eitt ynski um at seta á stovn eina føroyska Headspacemiðstøð, og tørvurin á einum slíkum ráðgevandi tilboði til ung, tykiskt at vera enn størri nú enn áður. Headspace er eitt fyribyrgjandi og heilsufremjandi lágott-tilboð, ið hevur verið í Danmark síðani 2013. Síðani eru Headspacemiðstøðir eisini komnar í Íslandi og Noregi, og hava víst góð úrslit. Í 2023 er Sinnisbati komið við í nýstovnaða norðurlendska paraply, *Nordic Headspace*, ið skal samstarva um Headspace í øllum Norðurlondum. Vit vóna, at ætlanin um eina føroyska Headspacemiðstøð kann blíva veruleiki í nærmastu framtíð.

Sinnisbati takkar øllum limum, stuðlum og sjálvbodnum hjartaliga fyri trúgvan stuðul í 2023.

Súsanna Olsen, forkvinna                    Gunnhild Persson, aðalskrivari



# UM SINNISBATA

Sinnisbati er ein politiskt og átrúðnarliga óheftur felagsskapur, ið virkar fyri at bøta um korini hjá teimum við sálarsjúku og avvarðandi teirra. Við støði í ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, arbeiða vit fyri at tryggja javnbjóðis møguleika og rættindi til okkara málbólk. Sinnisbati er eitt av 24 limafeløgum í MEGD, ið arbeiðir brekpolitiskt í øllum samfelagsviðurskiftum. Høvuðs-uppgávurnar hjá okkum eru millum annað at veita upplýsing og kunning um sálarsjúku, og vegleiða um tilboð og viðgerðarmøguleikar í Føroyum. Vit skipa fyri tiltøkum og átøkum, samskipa verkætlanir og sjálvhjálparbólkar, somuleiðis sum vit arbeiða politiskt fyri viðurskiftum, sum tæna okkara málbólki.

Eitt, ið hevur eyðkent felagið frá byrjan, er ymiskleikin, sum hevur myndað felagið og nevndina frá byrjan. Felagið er myndað av fakfólki, avvarðandi og fólkum við sjúkuroyndum, og hetta síggja vit sum okkara styrki.

## NEVNDIN

Aðalfundurin er hægsti myndugleiki í felag-num, og verður hildin á hvørjum ári. Nevndin verður vald á aðalfundinum, og er mannað av 5 til 7 limum og minst tveimum tiltakslimum. Nevndarlimir sita í nevndini í tvey ár senn. Aftaná aðalfundin skipar nevndin seg við forfólki.

Aðalfundurin 2023 varð hildin tann 28. februar í hølunum hjá MEGD á Íslandsvegnum.

Nógv fólk vóru møtt upp til aðalfundin, sum varð skipaður í tveimum pørtum. Margit Stóra, landsstýriskvinna í heilsummálum greiddi frá um ætlanirnar hjá nýggja landsstýrinum á sálarheilsuøkinum. Síðani vóru umboð frá sosialpsykiatriini hjá Almannaverkinum og greiddi frá teirra virksemi, og hvørji tilboð tey kunnu bjóða har.

5 av 7 nevndarlimum stóðu fyri vali í ár; Súsanna Olsen, Súsanna Herdalur Tausen, Vivian Sjóðklett, Rannvá Dam í Baianstovu og Oda Jóhansdóttir. Margretha Poulsen og Erla Matras Jensen stóðu ikki fyri vali. Øll, sum stóðu fyri vali, valdu at taka við aftur. Margretha ynskti at trekkja seg sum nevndarlim og blíva tiltakslimur, um onkur annar ynskti at koma framat. Minna Sólfinnsdóttir ynskti at stilla upp í nevndina, og kemur inn fyri Margrethu. Joan B. Poulsen og Elisabeth Carlsson ynsktu at forseta sum tiltakslimir.



**Eftir fyrsta nevndarfund skipaði nevndin seg soleiðis:**

- Súsanna Olsen, forkvinna
- Oda Jóhansdóttir, næstforkvinna
- Rannvá Dam í Baianstovu, kassameistari
- Súsanna Herdalur Tausen, skrivari
- Minna Sólfinnsdóttir, nevndarlimur
- Erla Matras Jensen, nevndarlimur
- Vivian Sjóðklett, nevndarlimur
- Margretha Poulsen, tiltakslimur
- Joan B. Poulsen, tiltakslimur
- Elisabeth Carlsson, tiltakslimur

## SKRIVSTOVAN

Á skrivstovuni starvast ein aðalskrivari 30 tímar um vikuna og eitt skrivstovufólk á 3 tímar um vikuna. Arbeiðsuppgávurnar hjá skrivstovuni eru fjølbroyttar. Aðalskrivarin hevur ábyrgd av dagligu fyrisitingarligu leiðsluni á skrivstovu felagsins, umframt ábyrgd av starvsfólkum og tilknýttum fríyrkisfólkum, og at tryggja, at ynskini hjá nevndini verða førd út í verk. Skrivarin tekur sær av bókhaldi og ymiskum fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni.

**Skrivstovan 2023**

Í 2023 er Ninna, okkara skrivstovufólk, farin frá 10 tímum um vikuna og niður á 3 tímar um vikuna vegna vantandi fígging. Tí hevur hetta eisini merkt arbeiðsorkuna á skrivstovuni í 2023.

Í 2023 hevur skrivstovan serliga arbeitt við at økja um tilboðið um sjálvhjálparbólkar og samskipa smærri og størri verkætlanir, luttikið á og samskift við politisku myndugleikarnar um viðurskifti á sálarheilsuøkinum og verið hoyringspartur í málum.

1. septembur og til og við novembur var John Sigurd Hammer í praktikk á skrivstovuni hjá Sinnisbata. John Sigurd lesur master í søgu á Fróðskaparsetri Føroya, og er serliga áhugaður í føroyskari psykiatrisøgu. John Sigurd arbeiddi serliga við at gera tilfar til heimasíðuna hjá Sinnisbata. Sinnisbati takkar honum mangar ferðir fyri hansara góða arbeiði, og ynskja vit honum blíðan byr víðari við lestrinum og hansara týdningarmikla arbeiði við føroyskari psykiatrisøgu.



*Gunnhild Persson, aðalskrivari*



*Ninna R. Simonsen, skrivstovufólk*

# ÁRIÐ, IÐ FÓR

Ein stórur partur av arbeiðinum hjá Sinnisbata er at upplýsa og varpa ljós á sálarsjúku og líðing, arbeiða fyri meira opinleika í samfelagnum, vera við til at avstigmatisera og beina burtur tabu av psykiatriskum diagnosum. Hetta ger felagið millum annað við at skipa fyri tiltøkum í Føroyum, gera upplýsandi átøk á eitt nú sosialu miðlunum og skriva lesarabrøv og vera sjónlig í miðlunum. Sinnisbati skipar m.a á hvørjum ári fyri stórum tiltaki á altjóða sálarheilsudegnum. Nógv ymiskt virksemi hevur verið í Sinnisbata í nevndarárinum 2023, og í hesum kapitlinum greiða vit nærri frá virkseminum.

## KJATT-RÁÐGEVINGIN HJÁ SINNISBATA

Síðan 2020 hevur Sinnisbati havt dulnevnda kjatt-ráðgeving á heimasíðu okkara, tá felagið vegna korona merkti ein stóran tørv á eini slíkari skipan. Tá vóru heili 345 samrøður á kjattinum.

Kjatt-ráðgevingin hevur síðani 2020 verið opin hvørt kvøld í vikuni ímillum 20.00-22.00. Ráðgevingin er mannað við fakfólki við heilsufrøðiligari, námsfrøðiligari og/ella sosial-fakligari útbúgving, ið sjálvboðið sita á vaktum á tveimum tímum um vikuna. Vegna vantandi orku, hevur Sinnisbati valt at skerja ráðgevingina úr 7 kvøldum um vikuna og niður í 5 í 2023.

Tað hava verið 50 samrøður í kjatt-ráðgevingini í 2023, ið er meir enn helvtina minni enn í 2022. Ein av orsøkunum til hetta, er allarhelst tí, at Sinnisbati í alt ov lítlan mun hevur lýst við ráðgevingini, orsaka av at arbeiðsorkan hevur verið lá í ráðgevingini og trupult hevur verið at mannað hana.

## SINNISBATI UNG

Sinnisbati Ung (SBU) varð stovnað í februar 2022 og er ungmannafelagið hjá Sinnisbata.

SBU hevur verið sera virkið síðani byrjan, og limirnir í ungmannafelagnum hava skipað fyri fleiri átøkum og tiltøkum, og luttikið á fundum og ráðstevnum. SBU er virkið á sosialu miðlunum, har tey regluliga leggja ymiskt út um sálarheilsu, fylgja við í tí, sum rørir seg í samfelagnum, og kjakast um sálarheilsuøkið í Føroyum.

Nevnast kunnu átøk sum Sárbærur Sunnu-dagur, Okkara Listasavn, Okkara Yrkingasavn og Okkara Stuttsøgusavn, har tey savna inn list, søgur og yrkingar frá fólki. Við Sárbærum Sunnudegi heitir SBU á fólk um at vera sárbær, deila egnar royndir, tosa um kenslur, og koma við ráðum og viðmælum um eitthvørt innan sálarheilsu. Tað eru bæði ung, eldri og fakfólk, sum eru við í Sárbærum Sunnudegi.

Á sumri 2023 hava limir í SBU luttikið á Mentanarnáttini og Summarfestivalinum, har tey hava havt bás við ymiskum spennandi á skrá. Millum annað hava tey spurt ung í Føroyum, hvat tey halda, manglar innan sálarheilsuøkið í Føroyum.

**Øll ung eru vælkomin**

Øll ung millum 15 og 30 ár, eru vælkomin at gerast partur av Sinnisbata Ung. Vit bjóða ein tryggan felagsskap, har pláss er fyri øllum, har rúm er fyri bæði stuttleika og álvara. SBU hittist regluliga mánakvøld til prát, hugna og samveru.




Meiri samrøðu-
viðgerð á
psykiatriska
deplinum


TAKIÐ
ENDULIGA


Fleiri
samrøðu
fólkar


UNDIRVÍSING OG
KUNNING UM
MØGULLEIKAR HJÁ
UNGUM. ♥


SinnisBatiUng
FYRIBYRGING!
FYRIBYRGING!
FYRIBYRGING!
SinnisBatiUng

## SJÁLVHJÁLPARBÓLKAR

Sinnisbati hevur havt eitt ynski um at hava fleiri sjálvhjálparbólkar til bæði børn, ung og vaksin í 2023. Í 2023 hava vit havt tríggjar avvarðandibólkar bæði til børn og vaksin, og ein bólk til ung, ið kenna ótta og angist.

**Bólkar í Suðuroy**

Eitt, sum hevur verið eitt ynski leingi, er at skipa fyri sjálvhjálparbólkum í Suðuroy.

Á vári 2023 skipaðu vit fyri tveimum sjálvhjálparbólkum í Suðuroy. Einum bólki fyri avvarðandi foreldur, makar, systkin og vaksin børn, og einum sjálvhjálparbólki fyri ung, ið kenna ótta og angist. Bólkarnir eydnaðust væl, og eru ætlanir um at hava fleiri bólkar í Suðuroy í 2024.

**TIME OUT**

Í heyst høvdu vit aftur Time Out bólk, ið er bólkur fyri børn 12-18 ár, ið hava foreldur og/ella systkin við sálarsjúku.

Eftirmetingarnar av Time Out bókunum siga okkum, at luttakararnir fáa gleði av at møta øðrum børnum og ungum í somu støðu, og tey kenna seg tí minni einsamøll. Í bólkunum er bæði pláss til hugna og stuttleika, og eisini fáa tey undirvísing í, hvat tað vil siga at hava sálarsjúku. Í 2024 ynskir Sinnisbati at raðfesta fleiri Time Out bólkar.

TIL TÍN, SUM HEVUR TØRV Á EINUM

TIME OUT

- Bólkur fyri børn og ung í aldrinum 12-18 ár, ið hava foreldur ella systkin við sálarsjúku

“Nú veit eg, at sálarsjúka ikki smittar”

“Eg tori betri at hava tað, sum eg havi tað, tí eg veit, at tað ikki bara eri eg”

“Eg skilji betri, hvussu mamma hevur tað, og hvat sálarsjúka er”

## VERKSTOVA VIÐ RØST

Í mars 2023 skipaði Sinnisbati saman við Amnesty Føroyum fyri verkstovu fyri ungum í aldrinum 15-30 ár við heitinum “lær at miðla ein boðskap”. Røst er ein talaraskúli og talarafestivalur, sum hevur til endamál at styrkja evnini og dirvið hjá ungum at taka orðið.




Tað kann vera trupult at vinna á nervøsitetinum og óttanum, og vita, hvussu tú best fært tín boðskap fram, tá tú skalt tosa frammanfyri øðrum. Á verkstovuni fingu ung góð ráð til taluteknikkir, og hvussu tú á bestan hátt kann bera tín boðskap fram.



## SUMMARSKEIÐ VIÐ VÁRNATÚR

Í juli skipaði Sinnisbati í samstarvi við VÁRNATÚR/Vár Næs, fyri summarskeiði. Skeiðið fevndi um tveir samanhangandi dagar, og var ætlað øllum, ið ynskja at styrkja sambandið við náttúruna, seg sjálvan og hvønn annan. Tað er vælegnað til tey, ið uppliva kropsligt óbehag og tankameldur, og ynskja sterkari kropstilvitan. Hetta var fyrsta skeiðið í royndarverkætlani, og ætlanin er at skipa fyri fleiri smáum skeiðum í framtíðini í samstarvi við VÁRNATÚR.

## ALTJÓÐA SÁLARHEILSUDAGUR 2023

Á hvørjum ári hátíðarheldur Sinnisbati altjóða sálarheilsudagin 10. oktobur. Í 2023 valdi Sinnisbati at leggja dent á evnið 'ung og sálarheilsa', og skipaði fyri tiltaki í Løkshøll í Runavík. Tað er nógv gransking, sum bendir á, at sálarligi trivnaðurin hjá ungum um allan heim er í afturgongd. Hóast hetta, eru møguleikarnir fyri at kunna fáa hjálp – her og nú – rættiliga sperdir. Vit síggja eitt stórt trýst á vælferðarskipanunum í Føroyum, eins og vit síggja í øllum Norðurlondum. Norðurlendsku vælferðarskipanirnar eru í alt størri mun grundaðar á viðgerð og í minni mun á fyribyrgjandi arbeiði og sálarheilsufremjandi átøk.

Á sálarheilsudegnum vitgjørdu vit, hvussu vit í Føroyum kunnu arbeiða meira fyribyrgjandi við sálarheilsu, og hvussu sivilsamfelagið og áhugafelagsskapir eisini kunnu vera partur av loysnini. Skráin var fjøbroytt við røðu, tónleiki, framløgum og sofapráti.

Annika Helgadóttir Davidsen frá Fróðskaparsetri Føroya og Monika Mohr úr Fólkaheilsustýrinum løgdu fram úrslit úr nýggjari kvalitativari kanning, sum varð gjørd fyri Fólkaheilsuráðið (nú Fólkaheilsustýrið), ið snúði seg um, hvat ávirkar sálarligu heilsuna hjá føroyskum ungum. Til dagin høvdu vit eisini bjóðað Jonas Begningna, ráðgeva í Headspace Danmark, Evu Ólafsdóttir, kliniskur leiðari í Headspace í Íslandi og Tom Guldberg, stjóra í Headspace Noregi og ein av stovnarunum av Nordic Headspace, at greiða frá um teirra arbeiði við Headspace. Eftir hetta var orðaskifti við Súsonnu Olsen, forkvinnu, Gunnvá Winther, virkandi forkvinnu í Sinnisbata Ung, Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismann í barna- og útbúgvingarmálum og Torbjørn Jacobsen, formann fyri stýrið fyri Kommunufelagi og borgarstjóra í Runavíkar Kommunu. Øll vóru tey samd um í orðaskiftinum, at Headspace er eitt gott tilboð, ið kann virka fyribyrgjandi í mun til mistrivna hjá ungum.

**Ársins sálarheilsuvirðisløn**

Sinnisbati handar á hvørjum ári eina sálarheilsuvirðisløn. Endamálið við virðislønini er at heiðra ein ella fleiri, sum hava varpað ljós á sálarheilsu. Fólk, sum hava gjørt eitt serliga gott arbeiði og/ella átak fyri at betra um korini hjá fólki við sálarsjúku og avvarðandi teirra. Tað hevur staðið øllum í boði at senda inn uppskot, og tað er ein óheft dómsnevnd, sum tekur avgerð.

**Bernhard H. Petersen heiðraður**

Í ár var tað Bernhard H. Petersen, sum fekk ársins sálarheilsuvirðisløn.

Bernhard hevur í mong ár verið virkin í Frelsunarherinum, har hann hevur gjørt eitt serliga gott arbeiði fyri heimleys í Føroyum. Hann var við í arbeiðinum, tá Frelsunarherurin fyri 25 árum síðani lat Herbergið upp.

Bernhard hevur brúkt mangar nætur saman við heimleysum í Frelsunarhersalinum, sum ikki hava aðrastaðni at vera, tí einki alment tilboð er til tey. Umframt at hann hevur gjørt nógv annað sjálvboðið arbeiði.

Sum arbeiðsgevari veitir Bernhard sperdum ókeypis eltænastur. Bernhard setur lærlingar starv og dugir væl at fáa tað besta fram í tí einstaka. Hann er tolin av lyndi og dugur væl at rúma øllum.

Vit ynskja við hesari virðisløn at heiðra Bernhardi fyri at hava víst serligt samfelags-sinni, menniskjaligheit og rúmd. Sum arbeiðsgevari hevur hann sýnt ta ábyrgd, tolsemi og fyrigeving fyri sínum lærlingum, ið ikki er at finna allastaðni. Í arbeiðinum í Frelsunarherinum hevur Bernhard víst, hvussu tú sum einstaklingur kann gera nakað munagott fyri onnur.




ALTJÓÐA SÁLARHEILSUDAGUR
10.10.23
UNG & SÁLARHEILSA


What do we know about our youth
• Around 1500 young people from 12-25 years old have used the service
• Average age is 19
• 71% girls and 29% boys
• 90% from Capital area - 56% from Reykjavik
• 47% have not used any service before
• 13% have had Child Protection interferance
• ACE – 43-47% have an ACE score 4 or above
• 2300 counselling sessions per year.
headspace


Hvad gør man når man har det for dårligt til at hjælpe sig selv og for godt til at gå til lægen?
headspace






ALTJÓÐA SÁLARHEILSUDAGUR
10.10.23
UNG & SÁLARHEILSA

## ALTJÓÐA MANNFÓLKADAGUR

Við fyrilesti, skemti, tónleiki og samrøðum skipaði Sinnisbati í samstarvi við Javnstøðunevndina fyri tiltaki á altjóða mannfólkadegnum 19. Novembur.

Ljós varð varpað á sálarheilsuna hjá monnum, og spurt: “Hvat merkja einsemi, sosial sambond og felagsskapur fyri sálarheilsu og trivna? Hví eru menn serliga útsettir í samtíðini? Hvussu megna vit at varpa ljós á hesi viðurskiftini, og hvussu kunnu vit bøta um tey?”.

Til høvið høvdu vit fingið Ph.d., sálarfrøðing og formann í Forum for Mænds Sundhed, Svend Aage Madsen, til Føroya at halda fyrilestur um evnið. Eftir fyrilesturin var sofaprát um menn, sálarheilsu og felagsskap við Pál Weihe, yvirlækna og professara í fólkaheilsu, Magna Højgaard, leiðara fyri RÓWT og Brandur Mortensen Nolsøe, samskipara hjá Javnstøðunevndini. Harumframt var skemt við Svannu Hentze í Gong og tónleikur frá Lyon Hansen.



## MIÐLAR, UMBOÐAN OG POLITISKI PALLURIN

Sinnisbati ynskir at vera við til at styrkja sálarliga økið í Føroyum og tryggja betri rættindi fyri okkara limum og málbólki. Tí er ein týðandi partur av arbeiðinum hjá Sinnisbata, miðvíst at vísa á tørvin á batum og hægri raðfestingum á økinum. Hetta ger felagið við at vera hoyringspartur í viðkomandi málum hjá politisku skipanini, gera vart við seg í miðlunum, skriva lesarabrøv og skipa fyri tiltøkum. Hatta hava vit eisini gjørt í fleiri førum í 2023.

**Headspace**

Sinnisbati er í 2023 blivið partur av norðurlendska samstarvinum Nordic Headspace, og hevur luttikið á ráðstevnu í Reykjavík í apríl og í Oslo í novembur. Í samband við ráðstevnuna í Reykjavík, vóru vit eisini á vitjan í teirra Headspacemiðstøð, Bergið. Vit komu aftur til Føroya við meiri vitan um, hvussu tey arbeiða við at fyribyrgja mistrivnaði ímillum ung í Íslandi.

Á ráðstevnuni í Oslo sluppu tey ungu til orðanna, og tað varð skipað fyri verkstovu um fyribyrgjandi átøk. Á verkstovuni luttók Elin Sólvør á Løgmansbø úr Sinnisbata Ung, og hon slapp eisini at leggja fram fyri hinum luttakarunum.






**Hoyringsskriv og lesarabrøv**

Í 2023 sendi Sinnisbati ummælisskriv í samband við broytingar í Psykiatrilógini um tvingsil. Sinnisbati fegnast um, at rættartrygdin hjá psykiatriskum sjúklingum verður styrkt við nýggju lógarbroytingunum, men gjørdi samstundis vart við nakrar stúranir í lógini. Øll hoyringsskriv hjá Sinnisbata kunnu lesast á sinnisbati.fo.

Í samband við at royndarskipanin við ókeypis sálarfrøðihjálp til ung millum 15-35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi, fór úr gildi 31. Oktobur 2023, sendi Sinnisbati áheitan til fíggjarnevndina í løgtinginum um at halda áfram við tilboðnum, umframt at felagið varpaði ljós á týdningin við skipanini í miðlunum, í lesarabrævið og sendi hoyringsskriv til Heilsumálaráðið. Hóast Sinnisbati, saman við fleiri øðrum, varpaði ljós á ynski um at framhaldandi veita ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til aldursbólkin 15-35 ár, bleiv tilboðið skert.

Umframt hetta, hevur Sinnisbati í 2023 skrivað lesarabræv um longu bíðilistarnar til Barna- og ungdómspsykatriina, tørvin á eini bráðfeingis-linju, og luttikið í fleiri hoyringsskrivum saman við MEGD og hinum limafeløgunum. M.a varð ein yvirlýsing frá øllum limafeløgunum send út í mars, har øll feløgini gjørdu vart við, at rættindini hjá børnum og ungum, ið bera brek, eiga at verða raðfest hægri.

## FRAMYVIR

Samanumtikið hevur 2023 verið eitt virkið ár hjá Sinnisbata. Fleiri spennandi verkætlanir eru í gerð og fara í gongd í 2024. Millum annað arbeiðir Sinnisbati við at seta ein sjónleik upp í Norðurlandahúsinum í mai mánaða í 2024, ið varpar ljós á sálarsjúku. Í 2024 arbeiðir Sinnisbati víðari við Headspaceverkætlanini, og vónandi verða vit eitt stig tættari at kunna lata eina føroyska Headspacemiðstøð upp. Somuleiðis er ætlanin at skipa fyri fleiri sjálvhjálparbólkum til bæði børn, ung og vaksin í Tórshavn og í Suðuroy.

Vit gleða okkum til enn eitt virkið nevndarár saman við okkara limum, stuðlum og samstarvspørtum.

**Sinnisbati**

c/o MEGD, Íslandsvegur 10C

FO-100 Tórshavn

Tlf: + 298 597913

Teldupostur: sinnisbati@sinnisbati.fo

www.sinnisbati.fo